Sálarfrø›ingur um børn hjá rúsevnismisn‡tarum:

Tey smáu tekinini siga frá

Í Føroyum hava vit allar teir sosialu trupulleikar, sum tey hava í ø›rum londum,var› sagt á ársfundinum hjá Rúsdrekka- og Narkotikará›num, sum hildin var› á Runavíkar Sjómansheimi leygardagin

RÚSEVNISMISN‡TSLA
Edvard Joensen

Runavík: Bæ›i forma›urin í barnaverndini í Havn og fyrrverandi skúlatjórin í Runavík søgdu seg kenna aftur ta›, danskur sálarfrø›ingur greiddi frá um egnar upplivingar vi› donskum misn‡tarabørnum.

Rúsdrekka- og narkotikará›i› hev›i bo›i› kliniska sálarfø›inginum Lisbeth Rask, sum hevur royndir vi› barna- og ungdómsarbei›i í Solrød Kommunu sunnan fyri København, at halda fyrilestur á ársfundinum. Evni› var, hvussu vit best kunnu hjálpa børnum, hvørs foreldur eru evnismisn‡tarar.

Lisbeth Rask seg›i, at ta› er sera umrá›andi, at umhvørvi›, i› børn hjá misn‡tarum, ella onnur børn vi› sosialum trupulleikum, fer›ast í, duga at síggja trupulleikarnar, barni› hevur. Barni› sigur sjálvt frá vi› sínum atbur›i. Ta›, sum um ræ›ur er, at onnur duga at t‡›a hesi tekin. Úr heiminum er eingin hjálp væntandi, tí misn‡tarin sjálvur heldur seg vanliga ikki hava nakran trupulleika.

Lisbeth Rask greiddi frá vanligu ey›kennunum, vit síggja hjá børnum hjá misbrúkarum. Alt frá misvøkstri frá fø›ing, til atfer›ina hjá størri børnum. Hon tosa›i um tey tekin, starvsfólki› á teimum stø›um, hesi børnini koma, eiga at leggja merki til. Serliga skúlar, ansingarstovnar og sovor›in stø›. Og ta› er ógvuliga umrá›andi, at tey fólkini, i› børnini koma til vi› sínum trupulleikum, eru fólk, sum børnini kenna frammanundan og hava álit á.

Summi børn senda ógvuliga veik tekin frá sær, og tá er ta› serliga umrá›andi, at tey vaksnu, sum eru um tey, eru vakin og kenna tey teknini.

Lisbeth Rask, sálarfrø›ingur helt fyrilestur á ársfundinum hjá Rúsdrekka- og narkotikará›num
Mynd: Edvard Joensen

Barni› ver›ur foreldur

Ta› lættasta er í grundini at taka n‡fø›ingin, har myndugleikarnir vita, at foreldrini eru misn‡tarar. Verri er ofta at fáa samband vi› tey eldru børnini, sum ofta verja bæ›i seg sjálv og foreldrini móti umheiminum, hóast stø›an er rættiliga vánalig heima.

Vanligt er at síggja, at børnini ver›a foreldur fyri foreldrini. Tey missa tann møguleikan, tey áttu at havt at veri› børn.

Lisbeth Rask seg›i, at hesi børnini útvikla serlig evni. Til dømis evnini til at kenna á umhvørvinum, hvussu stø›an er í dag. Hvussu lagi› er á teimum gomlu heima, og hvat tey skulu gera sjálv ella helst ikki gera.

Har›skapur er vanligur í slíkum umhvørvi. Ta› er rættiliga tyngjandi fyri børnini, at tey liva undir slíkum umstø›um. Men ikki minni tyngjandi er, at eingin leggur merki til, hvussu tey hava ta›. Tí tey duga minst líka væl sum tey vaksnu at goyma teir trupulleikar, tey hava.

Tey vilja ikki siga frá í skúlanum til dømis. Tí skúlin er líkasum eitt frísta›, tey hava, har tey sleppa undan, at nakar veit um stø›una og sostatt hava tey frí frá hesum trupulleikanum, seg›i Lisbeth Rask.

Alt eftir aldrinum á barninum, eru nógv tekin, sum ein skal leggja merki til, seg›i Lisbeth Rask. Tey kunnu til dømis knappliga finna upp á bara at r‡ma úr skúlanum.

Vinir tora tey ikki at fáa sær, tí ta› ber jú ikki til at hava børn heim vi›, tá ein aldrig veit, hvussu út sær heima. Tey vita jú aldrin, hvussu stø›an er heima. Kanska liggur mamman dey›, tá tey koma heim.

Verjumekaniskurnar, tey útvikla, gera, at tey hava ongan sans fyri at loysa trupulleikan. Tey hava ta› upp á sama máta sum tey eldru. Billa sær inn og trúgva, at har er eingin trupulleiki, og tí einki at tosa um.

Tá hesi børnini koma til myndugleikar, so sum sálarfrø›ing, lækna ella tílíkt, vísir ta› seg, at tey, sum hava mót til at vi›ganga trupulleikarnar, eru tey, sum klára seg best, Men tey gera ta› ikki, fyrr enn tey fáa loyvi frá foreldrunum at vi›ganga trupulleikan. Ta› vil siga í teimum førum, har foreldrini sjálv vi›ganga trupulleikan.

Eitt anna›, børnini vanliga bi›a um, er at sleppa undan ábyrgdini av teimum vaksnu. At sleppa at vera barn.

Men ta› hjálpir einki, um børnini koma vi› sínum trupulleikum, um eingir professiolnellir møguleikar eru fyri at hjálpa teimum, sigur Lisbeth Rask. Ta› er ógvuliga umrá›andi, at bæ›i fólk og høli eru til taks, til at hjálpa hesum børnunum.

Ta› er alt avgerandi, at hesi børnini ver›a tikin í álvara, og at tey kenna seg trygg vi› teimum fólkum og umstø›um, sum skulu hjálpa teimum.

Ta› er lívsavgerandi fyri barni›, at ta› kemur fram um tørvin hjá tí vaksna. Ta › er lívshættisligt, um málsvi›gerin tekur tørvin hjá foreldrunum fram um barni›. Til dømis for›ar fyri, at barni› ver›ur tiki› frá foreldrunum vi› teirri grundgeving, at so fara foreldrini í hundarnar. Um ta› hendir, ver›ur ta› altí› barni›, sum rindar tann høga prísin.

Arne Ludvig, fyrrverandi skúlastjóri, tosa›i um at hjálpa børnunum út frá skúlans sjónarhorni
Mynd: Edvard Joensen

Beate L. Samuelsen, barnaverndarforma›ur í Havn, greiddi frá arbei›inum hjá barnaverndini í høvu›ssta›num
Mynd: Edvard Joensen

Hava somu trupulleikar her

Teir trupulleikar, sum Lisbeth Rask greiddi frá, eru ikki bara at finna í Danmark, seg›i Beate L. Samuelsen, forma›ur í Barnaverndini hjá Tórshavnar Kommunu.

Júst somu trupulleikar eru at finna í Havn, seg›i hon. Ofta er her talan um rúsdrekkatrupulleikar, me›an ta› í Danmark ofta eisini eru a›rir rúsevnistrupulleikar.

Møguleikarnir eru oftaa til sta›ar fyri at fanga trupulleikarnar, á›renn barni› er føtt. Til dømis tá myndugleikararnir vita, at tann, sum er vi› barn, hevur rúsevnistrupulleikar. Tá ver›ur ofta arbeitt saman vi› jar›armó›ur og seinni heilsusystrum, seg›i hon.

Ta› er ikki so øgiliga ringt at finna fram til tey børn, sum hava trupulleikar heima, seg›i Beate L. Samuelsen. Ta› sæst væl í til dømis skúlanum, har næminganrir eru illa fyri. Ta› kann vera so ymiskt, sum leggjast kann merki til. Ofta fær barnaverndin frábo›an frá skúlanum, og so er bara at handla beinanveg. Barnaverndin møtir upp og avger so, hvussu farast skal ví›ari fram. Ta › kann í ringasta føri enda vi›, at barni› ver›ur tiki› heimanífrá, og flutt til betri og tryggari umstø›ur. Ta › veri seg familju ella á Barnaheimi›.

Hon greiddi frá dømum, har barnaverndin fekk frábo›an um barn, sum gekk í náttklæ›um úti á gøtuni og leita›i eftir mammuni á mi›ari nátt. Slíkum barni ver›ur fylgt vi›, og ta› ver›ur ikki slept uttan ví›ari.

Ikki er óvanligt, seg›i Beate, at hesi børnini, barnaverndin hevur samband vi› sum smá, koma aftur, tá tey eru vor›in eldri. So kann ein tosa um slagi› ella sosiala arvin. Men veruleikin er, at tey ganga aftur, seg›i hon.

Beate L. Samuelsen, helt, at ta› er stórur munur á umstø›unum í dag, og tá hon kom í barnaverndina fyri 16 árum sí›an. Til dømis eru fólk nógv kvikari at bo›a frá í dag. Bæ›i egnum trupulleikum og trupulleikunum hjá ø›rum.

Trupulleikin er størri, og málini eru tyngri, enn tey vóru fyrr. Men ein grund tykist vera, at fólk eru meira »uppmerksom« í dag enn fyrr at síggja trupulleikarnar.

Netverki› altavgerandi

Ta› er av ógvuliga stórum t‡dningin, at netverki› rundan um persónarnar vi› trupulleikum virkar, seg›i Arne Ludvig, fyrrverandi skúlastjóri, sum umrøddi máli› vi› atliti at skúlans sjónarhorni.

Arne Ludvig, sum hevur siti› í barnavernd í nógv ár, seg›i, at hann kundi vátta ta›, Lisbeth Rask seg›i. Hann kendi ey›kennini í ólukku mát. Hev›i sjálvur arbeitt bæ›i í Danmark og Føroyum.

Hann vísti á, at í umlei› helvtini av teimum førum, har kynslig misn‡tsla av børnum var ávíst, hev›i rúsdrekka veri› uppií.

Í hansara føri var at siga, at í kommununi, hann hevur arbeitt í, eru fá dømi um vanrøkt børn. Hann metti ta› var tí, at netverki› rundan um borgararnar í kommununi var so miki› gott, at her var› trupulleikin lofta›ur beinanveg, og fekk tí ikki loyvi at útvikla seg so grelt, sum kent er a›rasta›ni frá.

Hann hev›i uppliva›, at børnini vóru likamliga forsømd orsaka› av misn‡tslu heima. Børnini eru komin bæ›i svong og skitin í skúla. Her hevur skúlin tiki› sær av børnum, sum sjónliga hava veri› forsømd.

Ta› er upplagt, seg›i Arne Ludvig, at eitt barn, sum kemur skiti› í skúla og luktar, ver›ur happa›. Og so er aftur gali› vi› innlæringini, so alt gongur illa.

Hinvegin hevur skúlin ikki orku til at fara inn í heimi› at loysa teir trupulleikar, barni› har hevur. Men ta›, sum hevur vi› undirvísing at gera, kann skúlin taka sær av.

Ta› kann tó koma so vítt, at skúlin kennir seg noyddan til at siga ø›rum myndugleikum frá, so eitt nú barnaverndin kemur uppí.

Tó er ta› bert einafer› í hansara 35 ára starvstí› sum skúlastjóri hent, at barn er tiki› heimanífrá. Og har var broytingin total, seg›i Arne Ludvig. Barni› broyttist fullkomuliga og var› seinni rættiliga vælvirkandi persónur í samfelagnum.

Hann eftirl‡sti betri rá›geving til skúlan og lærararnar.Og hann helt, at samfelagi› átti at gjørt fleiri íløgur at hjálpt teimum, sum hava eitt misbrúk.

Men ta› er ringt, seg›i hann, tí misn‡tarin er ógvuliga ringur at hava vi› at gera. Hann er ofta tann einasti, sum ikki heldur seg hava trupulleikar av misn‡tslu.

Ta›, sum er mestsum altavgerandi, er at ta› persónliga netverki› rundan um tann, sum hevur trupulleikan, virkar, seg›I Arne Ludvig og leg›i aftrat:

»Væl eru dømini her hjá okkum bara nøkur heilt fá. Men tey heilt fáu eru nøkur heilt fá ov nógv.«